# Veðrurin kom við teimum sum yvirlivdu

**Stutt fyri døgurða mikudagin kom skipið hjá donsku sjóverjuni, Veðrurin, við teimum fimm sjómonnunum, sum yvirlivdu vanlukkuna, tá ið Jøkulfell sakk í ein landnyrðing úr Fugloynni**

SKIPSVANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Sjómenninir gista á Hotel Hafnia, áðrenn teir fara heimaftur í dag ella í morgin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, sigur, at menninir, sum eru fýra estlendingar og ein russari, skulu búgva á Hotel Hafnia, til teir í dag ella í morgin fara heimaftur.

Hann sigur, at bæði reiðarí og ambasada tóku sær av monnunum, nú teir komu í land eftir vanlukkuna, og hart raktu sjómenninir fáa eisini neyðuga kreppuhjálp.

Tá ið Sosialurin tosaði við Jón Klein, hevði Veðrurin júst lagt til bryggju, og politiinspektørurin segði seg ikki ivast í, at neyðuga hondin verður tikin um hesar menninar, sum komu undan vanlukkuni við lívinum.

Tað var tyrlan hjá donsku sjóverjuni, sum tók hesar menninar upp og flutti teir umborð á Veðrin, sum so í gjár kom á Havnina við teimum.



*– Hond verður tikin um menninar, sum komu undan skipsvanlukkuni við lívinum, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Estlendingar og russar

Av teimum fýra estlendingunum, sum yvirlivdu, var ein 30 ára gamal (2. stýrimaður), ein 50 ára gamal (2. meistari) og síðan tveir, sum vóru ávikavist 24 og 28 ára gamlir. Teir vóru dekkarar. Russarin, sum yvirlivdi, var 38 ára gamal; hann var eisini dekkari.

Av teimum, sum eru funnir deyðir, er skiparin á Jøkulfelli, sum var estlendingur og 52 ára gamal, ein annar estlendingur, sum er 38 ára gamal og 1. stýrimaður og ein triðji, sum eisini er estlendingur, 51 ára gamal og kokkur umborð. Russarin, sum er funnin deyður, er 23 ára gamal og var maskinmaður umborð.

Teir báðir, sum ikki eru afturíaftur komnir, eru ein russari, sum er 53 ára gamal og var 1. meistari umborð og ein estlendingur, sum er 37 ára gamal og sigldi sum dekkari.




# Tjaldrið og Brimil á Havnini við líkunum

**Mikunáttina komu Tjaldrið og Brimil á Havnina við teimum fýra líkunum, sum funnin vórðu á leiðini, har farmaskipið, Jøkulfelli, sakk mánakvøldið einar 55 fjórðingar í ein landnyrðing úr Fugloynni**

SKIPSVANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Skipsvanlukkum sleppa vit tíverri ongantíð undan, so leingi siglt verður um høv. Soleiðis kann tað ganga, tá ið ringast vil til á havinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Djóni Weihe á sjóbjargingarstøðini MRCC-Tórshavn sigur, at líkini vóru ikki rikin langt av leið, men funnin nærhendis, har vanlukkan hendi. Tey vórðu funnin eitt og eitt í senn.

Tjaldrið fann tvey av líkunum, Brimil fann tað eina, og ein russari fann eisini eitt lík.

Tá ið skipini komu á Havnina mikunáttina, hevði Tjaldrið trý lík umborð, og Brimil hevði eitt. Tjaldrið tók líkið upp, sum russarin fann.

## Sjógvur og kuldi

Djóni sigur, at soleiðis, sum hann hevur skilt støðuna, vóru sjómenninir í yvirlivilsisdrakt, men hann heldur ikki, at teir allir høvdu havt stundir at syrgt fyri, at sjógvur ikki lak inn í búnan.

– Tíðin hevur eftir øllum at døma verið ógvuliga knøpp, tá ið vanlukkan hendi, soleiðis at menn ikki hava havt stundir at hálað snarlásini heilt upp fyri at halda sjógvi og kulda úti.

Manningin umborð á Jøkulfelli taldi 11. Tá ið tyrlur og skip komu á staðið eftir stutta neyðarkallið, vórðu fimm mans funnir á lívi. Leitað varð eftir hinum seks monnunum, men tað eydnaðist ikki at finna nakran teirra á lívi.

Seinni vórðu so tey fýra líkini, sum Tjaldrið og Brimil førdu til lands, funnin. Tveir av sjómonnunum eru framvegis ikki afturíaftur komnir.

Jøkulfelli var á veg úr Liepaja í Letlandi til Íslands við 2.000 tonsum av stáli, tá ið vanlukkan hendi.

Manningin er úr Ruslandi og Letlandi.

Skipið er heimahoyrandi í Estlandi, er skrásett á Isle of Man og hevur seinasta árið verið í sigling fyri Samskip.

## Næmingar umborð

Bæði umborð á Tjaldrinum, sum førdi trý av líkunum til lands og umborð á Brimli, sum førdi tað eina líkið til lands, eru umframt manningina, eisini næmingar úr fólkaskúlanum í starvsvenjing.

Jákup Müller, skipari á Brimli, segði í stuttari viðmerking í gjáramorgunin, at teir hava tveir næmingar umborð, og at Tjaldrið somuleiðis hevur tveir.

– Vit sita á fundi í løtuni og tosa um, hvussu vit skulu handfara hetta málið.

Spurdur, um hugsandi er, at sálarhjálp verður veitt næmingunum manningini annars undir slíkum umstøðum, sigur hann, at tað dugir hann í løtuni ikki at siga.

– Tað er eisini hetta, vit tosa um nú, segði hann.

Jákup sigur, at næmingarnir, sum eru við Brimli, vóru í koyggjuni, tá ið teir tóku líkið upp.

– Eg haldi, at teir hava dugað ógvuliga væl at tikið hetta, sigur hann.

Tíverri fingu vit ikki høvið at tosa meira við Jákup Müller um støðuna í hesum umfari.